## Eldur í háhúsum

Seint í gjárkvøldi kom eldur í eini 159 metrar høg háhús í kinesiska høvuðsstaðnum Beijing. Eldurin kyknaði í einum hotelli, sum bleiv brúkt í sambandi við teir olympisku leikirnar í fjør, men sum hevur staðið tómt í seinastuni. Umframt hotellið hýstu háhúsini einari almennari sjónvarpsstøð. Tað tók sløkkiliðsmonnunum fýra tímar at fáa tamarhald á eldinum, sum sambært kinesisku myndugleikunum kyknaði av fýrverki. Løgreglan flutti umleið 1.000 fólk burtur úr grannalagnum.



## Senatið samtykt hjálparpakkan

Eftir togan í fleiri dxagar samtykti amerikanska Senatið seint í gjárkvøldi uppskotið hjá stjórnini um ein búskaparligan hjálparpakka. Í pakkanum eru 827 milliardir dollarar ella 4737 milliardir krónur. Hetta hildu fleiri republikanskir senatorar vera ov nógv, og sambært CNN vísa meiningakanningar, at flestu amerikanarar halda eisini pakkan vera ov stóran. Senatið fer ætlandi í dag at atkvøða um, hvussu pengarnir í pakkanum skulu brúkast. Barrack Obama, forseti, hevur sagt, at hann ætlar sær at staðfesta lógina seinast tann 16. februar.

# Djurholm hartar lokalpolitikarar

**Bjarni Djurholm, løgtingsmaður, hartar politikarar úr Suðuroy fyri at fara so glaðbeintir eftir hesum hugskotinum at flyta øll almenn skip til Suðuroyar. - Sakliga grundgevingin tykist tí í so tunn og ber tí brá av at vera produserað meira fyri at hava eina grundgeving enn at byggja á haldgóðan botn, sigur Bjarni Djurholm, sum helt, at tílíkur politikkur var lagdur á hillina**

SKIPARAKSTUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í samband við, at Jacob Vestergaard og Jóhan Dahl, landsstýrismenn, eru positivir fyri at flyta skipini hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni og Fiskirannsóknarstovuni til Suðuroyar, og at leggja tey undir Strandferðsluna, sum Sosialurin skrivaði um í gjár, hevur Bjarni Djurholm gjørt ein skrivligan fyrispurning til partamann sín Jacob Vestergaard, sum í síni tíð flutti Strandferðsluna til Suðuroyar.

Fyrispurningurin ber mest brá av, at Bjarni Djurholm sáar iva um argumentini hjá Fiskivinnumálaráðharranum.

- Argumentini mugu so merkja, at manningarnar skulu í mesta mun vera úr somu oyggja/øki, og at provianteringin somuleiðis skal fyriskipast av veitarum í ávísum umhvørvi, sigur Bjarni Djurholm. Ein av spurningunum er beinleiðis, um ætlanin er at syndra stovnar í høvuðsstaðnum, sum hava virkað. Spurningurin ber eisini brá av, at løgtingsmaðurin heldur tað vera undarligt, at ætlanin er at føra eitt slag av útjaðarapolitikki, sum fyri langari tíð síðani var lagdur á hillina.

### Populistisk avgerð

Bjarni Djurholm heldur somuleiðis, at avgerðin er populistisk. Hann spyr um motivatiónina til avgerðina.

Fyrstu ferð hugskotið at flyta raksturin av skipunum til Suðuroyar var alment frammi var til móttøkuna har Bogi Mortensen tók við sum Strandferðslustjóri. Tá var tað Dánjal Andreasen, fráfarin stjóri, ið hevði uppskotið frammi, og heitti á politikararnar at hugsa um møguleikan at leggja skipini hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni og Fiskirannsóknarstovuni undir Strandferðsluna.

### Ivast í sparing

Bjarni Djurholm undrast eisini, um ætlanin veruliga er at spara pening, ella um tað bara er lokalpolitikkur, sum er á skránni.

- Er tað ynski um at rationalisera ella bert fyri at flyta virksemi úr Tórshavn í útjaðaran, spyr Bjarni Djurholm. Sum fer at seta Jacob Vestergaard spurningin í morgin.



*Bjarni Djurholm heldur onki um hugskotið við fleiri skipum til strandferðsluna, tí hann heldur tað vera populistiskt*

# Strandferðsla og Vinnumálaráð positiv um fleiri skip

**Jóhan Dahl, landsstýrismaður, og Bogi Mortensen, Strandferðslustjóri, síggja eitt stórt alment reiðarí, sum eina loysn, ið skal kannast út í æsir, tí teir vilja báðir fegnir vera við at gera sparingar fyri landið**

SKIPARAKSTUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í gjár skrivaði Sosialurin, at Jacob Vestergaard heldur tað vera eitt gott hugskot at leggja raksturin hjá skipunum hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni og Magnusi Heinasyni saman við skipunum hjá Strandferðsluni. Hetta heldur Elmar Højgaard, stjóri á Vaktar- og Bjargingartænastuni, ikki vera nakað gott hugskot, og kallar tað »frat etandi ørt.« Tí hann ikki dugir at finna nakran fyrimun við hesi loysn.

Báðir stovnarnir, ið skulu taka ímóti skipunum er tó samdir, og halda hugskotið vera áhugavert. Verður raksturin fluttur, so skal Vinnumálaráðið taka sær av skipum, ið fyrr hava hoyrt undir Fiskivinnumálaráðið.

- Tað ljóðar ikki heilt órímiligt, at gera okkurt tílíkt, men vit mugu sjálvandi kanna um henda umskipan hevur nakrar fyrimunir, so gera, at vit kunnu spara eitt sindur, sigur Jóhan Dahl.

Hesum tekur Bogi Mortensen undir við.

- Eg eri positivur fyri øllum, sum ger, at vit spara eitt sindur av peningi. Tað er næstan eitt krav til almennar stjórar, at er ein rationalisering gjørlig, so skal hon gerast, sigur Bogi Mortensen, sum ikki vil úttala seg ov nógv um málið. Men hann nevnir eisini, at eitt samstarv um olju og proviant er eitt gott hugskot.

### Fá skip afturat

Bogi Mortensen vísir eisini á, at teir longu hava nógv skip um hendi, og tí skuldi tað í prinsippinum ikki gjørt so nógvan mun, um teir fingu nøkur fá afturat. Hann sigur somuleiðis, at hetta kundi givið øllum møguleika fyri at spara eitt sindur, og at reka eina sunnari fyritøku.

Jóhan Dahl er púra samdur.

- Tað er púra burturvið, at landið skal hava heili trý reiðarí til so fá skip, og eg dugi ikki at síggja nakran vansa við at velja hesa loysnina, men tað er ikki nakað, ið bara skal gerast. Vit mugu sjálvandi kanna málið gjølla, áðrenn vit gera nakað, sigur landsstýrismaðurin við vinnumálum.

### Ger ikki nakran verri

Jóhan Dahl heldur somuleiðis, at grundgevingarnar hjá Elmari Højgaard vera nakað tunnar, tá stjórin á Vaktar- og Bjargingartænastuni sigur, at hann er bangin um viðlíkahaldið av skipunum.

- Eg dugi illa at síggja fyri mær, at vit skulu niðurprioritera nakran part, sigur landsstýrismaðurin. Hann leggur afturat, at um hetta gevur nakran fyrimun fyri rúgvuna í landskassanum, so er tað heilt víst nakað, ið skal kannast nærri.

- Ein og hvør sparing og effektivisering skal vera vælkomin í hesum døgum, sigur Jóhan Dahl.

### Kanna málið

Jóhan Dahl vísir eisini á, at øll henda tilgongd má gerast í tøttum samstarvi við Fiskivinnumálaráðið, ið varðar av hinum skipunum.

- Hetta er nakað, eg og Jacob Vestergaard hava tosað um, og øll tilgongdin má sjálvandi gerast í tøttum samstarvi við Fiskivinnumálaráðið, sigur Jóhan Dahl.



Sosialurin
Dejan var hetjan
Nr. 27 • Mánadagur • 9. februar 2009 • 83. árg. • Kr. 20,00
Vit skulu hava eitt alment reiðarí, har dentur verður lagdur á at spara í kreppotíðum. Tí skulu Magnus Heinason og vaktarskipini leggjast saman við Strandferðsluni, heldur Jacob Vestergaard.
- Frat etandi ørt, sigur Elmar Højgaard, stjóri á Vaktar- og Bjargingartænastuni
FLYTA ØLL ALMENN SKIP TIL TVØROYRAR



*Vinnumálaráðharrin og Strandferðslustjórin duga illa at síggja nakrar vansar við fleiri skipum undir bygnaðinum hjá Strandferðsluni*